# Lætt og leskiligt

**Á básinum hjá MBM verða í ár tvær kvinnur við, sum vilja marknaðarføra teirra nýggju kókibók, sum kemur út síðst í oktober. Talan er um eina bók við soltnum og sunnum mati, sum er lættur og skjótur at gera**

VØRUMESSAN 2003
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tað eru tær báðar Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðsluhúsarhaldsfrøðingur, og Elisabeth Akursmørk, økonoma, sum geva hesa kókibókina út.

Alt tilfarið er tilreiðar, men bókin er tó ikki prentað enn. Men fyri tað fer tað at bera til at síggja bókina á messuni. Við eini uppivørpu fara tær at vísa bókina, tí hon er sum sagt liðugtgjørd.

Tær báðar Jóhanna og Elisabeth fingu hetta hugskotið av reinum áhuga. Tær halda so avgjørt at tað manglar ein tílík kókibók í Føroyum, og tískil fóru tær undir at fáa eina útgivna. Eisini halda tær, at sunnur matur og lívsstílur er so nógv uppi í dag og so aktuelt millum fólk, at tað kann vera gott at eiga eina uppskriftsbók, har ein kann royna ymsar rættir og síggja, hvussu lætt og skjótt tað kann vera at gera ein leskiligan rætt, sum er sunnur.

– Fólk hugsa nógv um, hvat tey eta í dag. Tú kanst næstan ikki opna eitt vikublað, uttan at tað eru onkrar uppskriftir upp á sunnan mat og so framvegis, sigur Jóhanna á Tjaldrafløtti. Hon leggur afturat, at tað sum er serligt við júst Lætt og Leskiligt er, at hon er tillagað føroyingum og okkara matvanum.

– Har er lasagne og annað tílíkt, men tað eru alt rættir, sum vit kenna – men bara í eini soltnari útgávu. Ikki teir serføroysku rættirnir, tí har hava vit bók frammanundan, men rættir, sum vit kenna og eta ofta, siga tær báðar.

Elisabeth vísir á, at ein onnur orsøk til, at tær eru farnar undir hetta er, at tær til dagligt í teirra starvi á Húsarhaldsskúla Føroya arbeiða við at upplýsa um sunnan mat og læra frá sær at gera sunnan og góðan mat. Eisini hava tær skeið við fólki, sum koma til skúlan at læra seg at broyta matvanarnar. Og hetta hevur so avgjørt eisini verið við til at givið íblástur til bókina.



*Bókin Lætt og Leskiligt kemur væntandi út seinast í oktober*

### Diabetikaramatur

Bókin, sum tær báðar fara at geva út, eitur Lætt og Leskiligt, og hon inniheldur yvir 100 uppskriftir uppá góðan og sunnan mat. Har eru uppskriftir upp á bollar og breyð, døgurðamat, náttúrðamat, suppur køkur og omaná. Alt í eini soltnari útgávu. Harafturat er ein partur serliga til diabetikarar.

– Diabetikarar kunnu eta allar rættirnar, sum eru í bókini, uttan køkurnar og omaná. Tí hava vit valt at gera ein heilt serliga part av tí til fólk við diabetes, greiðir Elisabeth frá.

– Talið á fólkum við diabetes typa 2 veksur alsamt, og tað kemur ofta fyri, at fólk standa og skula gera eitt hvørt til ein serligan dag og vita ikki, hvat tey skulu finna uppá, tí ein av gestunum er diabetikari. Tá kann Lætt og Leskiligt vera ein góð hjálp, halda tær báðar, Elisabeth og Jóhanna.

Lætt og Leskiligt verður sum sagt at síggja á básinum hjá MBM á vørumessuni. Tær báðar siga, at tær verða júst á básinum hjá teimum, tí tær halda, at MBM hevur nøkur sera góð og sunn produktir, sum tær nýta nógv í matgerðini og teirra dagliga starvi.

# Nýtt frá Malaco

**J.F. Kjølbro Heilsøla úr Klaksvík verður við á vørumessuni um vikuskiftið. Meginparturin hjá teimum verður Malaco, men okkurt annað spennandi eisini**

VØRUMESSA 2003
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sløgini frá Malaco verða nógv í tali á vørumessuni. Sum nakað nýtt er Malaco farið undir at royna seg við smærri bommposum, og hesir verða at síggja á vørumessuni. Talan er um eini seks nýggj sløg, sum verða at fáa í hesi minni støddini av posum. Sjálvandi verða teir stóru posarnir eisini við.

So verður eitt stativ, har Lagermenn, rullur og annað leskiligt verður á. Tað er nakað, sum á donskum verður kallað børnedisplay.

Kjølbro Heilsøla fer eisini at hava okkurt við úr Noregi, men meginparturin á básinum verður Malaco, sum er teirra besta vøra. Hana vilja tey marknaðarføra við hvørt høvi, sum býðst.

Men tó so hevur Heilsølan nakað heilt annað við eisini. Tað er nevniliga postalín. Tað verður ein partur av básinum hjá teimum nýttur til. Talan er um postalín, sum er serliga væl egnað til fyritøkur, stórar køkar, skip og virki til dømis. Til ber eisini at fáa logo uppá tað.

Privatfólk kunnu sjálvandi eisini nýta tað, men tað er eitt, sum ger, at hetta postalínið er serstakliga vælegnað til skip og annað. Tað er sterkari enn vanligt postalín og brotnar sostatt ikki so lætt.











